# Søluframsýning í Müllers pakkhúsi

***Føroyskt handverk og listhandverk***
***13. – 21. september 2003***

G l u g g a g l æ m a

Í døgunum 13.-21. sept. í ár verður skipað fyri forvitnisligari søluframsýning við livandi verkstaðum í Müllers pakkhúsi í Havn. Søluframsýningin ber heiti "Gluggaglæma" og er ein sjálvstøðug verkætlan undir Føroya Heimavirkisfelag. Vinnuframagrunnurin, Tórshavnar Kommuna og einstaklingar stuðla tiltakinum.
Endamálið við "Gluggaglæmu" er at skapa eitt nýtt og øðrvísi søluumhvørvi fyri tey, ið ynskja at koma longri á leið við handverkinum enn bert til dagdvølju ella ítriv. Somuleiðis at útvega teimum møguleika at fáa royndir innan nýggjar sølu- og framsýningarhættir.

**Müllers Pakkhús**
Müllers Pakkhús, sum partur av gomlu Havnini, er í sjálvum sær ein áhugaverdur bygningur. Húsið er nýliga umvælt og verður javnan nýtt til almenna móttøku hjá Tórshavnar Býráð. Ein søluframsýning av føroyskum hand- og listahandverki innan hesar sermerktu karmar fer ivaleyst at vekja ans hjá mongum.

**Livandi verkstaðir**
Framsýningin verður skipað sum eitt livandi verkstaðarumhvørvi, har dygdargóðar vørur verða framleiddar, og har vitjandi fáa høvi til at síggja, hvussu vørurnar verða framleiddar. Hin einstaki framleiðarin fær somuleiðis eitt beinleiðis samskifti við keyparan, nakað sum kann geva honum royndir og íblástur til framhaldandi menning.

**Handverksgreinar**
Á søluframsýningini eru ymiskar handverksgreinar umboðaðar hvør á sínum avmarkaða øki: *Binding – Vevnaður – Ull & Tøving - Træarbeiði – Leirlist - Horn & Bein - Skinn & roð – Jarnsmíð – Stein & Grót – Bátasmíð.*

**Fjølbroytt skrá**
Umframt høvuðstáttin, livandi verkstaðir, verða fyrilestrar um evni, ið snúgva seg um føroyskt handverk. Annað til gamans verður kafé við heimabakstri, tónleikur, sangur, mótasýning v.m.

***Tilmelding: Innan 7. juni 2003***

Hand- og listhandverkarar kring landið, ið ynskja at luttaka, verða bidnir um, innan 7. juni 2003, at venda sær til verkætlanarleiðara Randi S. Vang fartlf. 514265 ella t-post: ransiva@post.olivant.fo
Møguleiki er at melda seg sum luttakara í ein, fleiri ella allar dagarnar. Kostnaður fyri luttøku er 400,-kr. um dagin.

*Framsýningin verður opin soleiðis:*

| | |
|---|---|
| Fríggjadag og leygardag | kl. 10.00 – 23.00 |
| Mánadag – hósdag og sunnudag | kl. 14.00 – 20.00 |

## Aðalfundur

Epileptikarafelag Føroya hevur ársaðalfund í MBF-húsinum,Íslandsvegur 10

**12. juni kl. 19.00.**

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

**Nevndin**

## Nólsoyar skúli

Søkt verður eftir lærara at undirvísa uml. 15 tímar um vikuna vegna avlopstímar.

Lærarar, sum kunnu undirvísa í samskipaðari byrjunarundirvísing og/ella fremmandamáli hava fyrimun.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Freist at lata inn skrivliga umsókn er 2. juni.

Meir fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 327033/327119 ella til skúlastýrið.

**Nólsoyar skúlastýri**
v/ Annu Marnu Holm
FO-270 Nólsoy · Tlf. 327017


alfa*transport*
Vit átaka okkum allan vøruflutning
▶▶ Ring og fá eitt gott tilboð
tel 50 51 91 • t-post: alfa@kallnet.fo

ConTrade sýnir bjargingarútgerð á Bátastevnuni í Vestmanna
Básurin er í kjallaranum í ATLANTIS
CT ConTrade
RING OG FRÆTT NÆRRI
Fart. 21 26 11

FA. GRAVSTEINAR


Opi¶: m nadag – fr ggjadag 9⁰⁰–17⁰⁰
annars samb rt avtalu.
V¿ruskr kann f ast!
Sj nband - 31 77 74

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Vilt tú bil hýra - ring 311234
Nú fáast eisini Talutíðarkort
Føroya Tele Kall
BENZIN
DIESEL
KIOSK

AUTO
311234




## TILTØK

**Gudstænastur**
**5. sunnud. e. páskir**
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Heri Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Argja kirkja:* kl. 14, familjugudstænasta, Heri Joensen
*Hvannasund:* kl. 12, Elsa Funding
*Kvívík:* kl. 12 skriftmál kl. 11.50, Marjun Bæk
*Klaksvík:* kl. 11 lestur
*Mikladalur:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
*Hellurnar:* kl. 11, altarg., Uni Næs
*Norðskála:* kl. 11, Peter O. K. Olofson altarg., kirkjukaffi aftaná, kl. 17 Emil Olsen, barnagudstænasta
*Haldarsvík:* kl. 11,
*Tjørnuvík:* kl. 12, Emil Olsen
*Skála:* kl. 11 Jógvan Fríðriksson, tríggir kingomenn syngja
*Nes:* kl. 11, deknagudstænasta
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð
*Miðvágur:* kl. 11, Inga Poulsen Dam
*Tvøroyrar kirkja:* kl. 11, Jónsvein Bech, altarg.
*Vágur:* kl. 11, Ólavur Ramussen

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Dýri biðidagur tlf. 44 80 16
Leygardagin 24.5. Eiði tlf. 42 30 06
Sunnudagin 25.5. Fuglafjørður tlf. 44 40 38

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Sælir eru tey í andanum fátæku,*
*tí at himmiríki er teirra«,*
*Mat 5,3.*

»Sælur er..« Jesu troystarríku orð sveipa tað hóttamikla myrkri í Guds ljós. Eru tey blind ella síggjandi, lamin ella gongufør, deyv ella hoyrandi, rík ella fátæk - týdningarmeiri enn alt hetta er, um menniskju kenna tað gávuríka ljósið, frá honum, sum er Guds ljós í okkara heimi. Við honum er Guds ríki komið nær. Tað sæst ikki, men er nær. Tað er nær í gleðiboðskapinum og har, lívið verður livað í trúgv, vón og kærleika.

»Alt myrkur umskapast, tá ein menniskja, sum hevur nakað at geva, fer inn í tað«, er sagt. Tey eiga eina innari styrki, eitt ríkidømi at oysa av, sum umskapar myrkri; og myrkri kring um tey verður, sum alljósur dagur, um enn myrkri er myrkt og ljósið ikki sæst.

Samantvinnað við Jesu sæluprísan er Jesu egni persónur. Hann gekk niður í myrkastu dýbdir, men myrkri umbroyttist, tá hansara orð og gerningar stigu inn í tað. Orðini »sæl eru tit og tey...« (Mat 5,1-12) eru máttmikil. Tey fáa innihald frá honum, sum Gud hevur sent til at slóða veg fyri Guds ríkis sælu. Mitt øllum veraldar myrkri er ljós, mitt í óttanum er trúgv. Hin krossfesti og upprisni Jesus Kristus hevur opinberað, at hann tekur tína trúgv og tín iva inn í alt sítt, sína frelsu og sælu. Og »sælur er tann, ið tekur ímóti Guds orðið og varðveitir tað«.

**Inga Poulsen Dam**


YVIR-STÝRIMAÐUR
TIL MF NORRÖNU

Søkt verður eftir yvirstýrimanni til Norrönu at byrja sum skjótast.
Viðkomandi skal ikki vera yvir 45 ár, skal hava hollar royndir sum yvirstýrimaður/ skipari við stórum skipum (yvir 10.000 BT) umframt øll prógv/ skeið, ið krevjast til ferðamannaskip í altjóða sigling.
Umsóknir saman við avriti av prógvum og CV skulu stílast til stjórnina og vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 28. mai 2003.

SMYRIL LINE
Postboks 370
110 Tórshavn


SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Nýggja Norröna er 36.000 BT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Carlsberg Cup
Einstaklinga-kapping
31. Mei 2003
er stóri dagurin
tá Føroya Besti Bowlari skal finnast!
Nú hevur tú møguleikan at vísa at tú er Føroya besti bowlari !
Carlsberg
stuðlar kappingini
Tilmelding 100.-
Seinasta freist at melda til er 29. mei 2003
Tað verður avmarkað tal av luttakarum, so skunda tær at melda teg til!
Carlsberg
BOWLINGHØLLIN Á HÁLSI
Tel. 31 21 21